## Gudjohnsen liðugur í Barcelona

Eidur Gudjohnsen spælur eftir øllum at døma ikki í Barcelona í komandi kappingarári. 30 ára gamli íslendingurin hevur fingið boðini frá leiðsluni í felagnum, at hann ikki er ynsktur hjá nýkosna spanska meistarafelagnum. – Gudjohnsen heldur ikki fram, og framtíðin er óviss. Hann hevur fleiri møguleikar, og Aston Villa, Fulham og Everton hava millum annað sýnt honum áhuga, sigur Arnor Gudjohnsen, sum er pápi og leikaraumboðsmaður hjá Eidur Gudjohnsen.



## Van Persie stílar høgt

Robin Van Persie úr Arsenal ætlar sær nú at verða heimsins besti fótbóltsspælari. Tað sigur hann í samrøðu við Sportinglife. – Eg eri ikki í samráðingum við onnur feløg. Eg vil verða tann besti í heiminum. Mín yrkisleið verður bara ein succes, um eg fái heiðurin, staðfestir Robin Van Persie, sum fyri trimum árum síðan skifti til Arsenal úr Feyenoord.

# Oyggjaleikir í my




Bogaskjóting er ein av drúgvaru kappingargreinunum. Allan mánadagin varð skotið á longru teinunum, og í dag fæst so at vita, hvussu samlaða úrtøkan er í einstaklingakappingini

Mynd: Álvur Haraldsen



Fyrsta heiðursmerkið, sum Føroyar vunnu á Oyggjaleikunum í ár, vann Skarpheðin Njálsson, tá hann vann silvur í vektbólkinum +100 hjá monnum í Judo

Mynd: Álvur Haraldsen





Skjóting er hampuliga nýggj grein í oyggjaleikahøpi, men eingin ivi er um, at hetta er ein kærkomin avbjóðing, sum føroysku skjúttarnir fegnast um

Mynd: Álvur Haraldsen




Varaforsetin hjá ÍSF, Petur Elias Petersen, var gestur í studio hjá Rás2 týsmorgunin

Mynd: Álvur Haraldsen



Lagnan var hørð við Gutta Harryson, sum mátti berast av gólvinum, tá hann keikti sær fótin

Mynd: Álvur Haraldsen